## DAGSINS MEINING

# Í takt við umheimin

Tá hesar reglur vórðu skrivaðar, vistu vit av góðum grundum ikki, hvussu tingmenn fóru at taka ímóti løgmansrøðuni og tí fáa vit ikki í skrivandi løtu gjørt viðmerkingar til framsøgurnar. Í blaðnum í gjár var áhugaverd viðmerking til løgmansrøðuna frá navngivnum persóni, ið er kendur fyri gløggar samfelagsanalysur og sum mangan hevur staðið fyri teimum fáu filosofisku íkastunum til samfelagsorðaskiftið í Føroyum. Víst verður á, at her er røðan, sum bíða hevur verið eftir. Greinskrivarin fer ikki inn í smálutir, men vísir á, hvussu neyðugt tað er at hava mál og strategiir í dagsins samfelagi. Høvundin ger vart við, at tað, sum nú umrøður er, at tað, sum vit seta í verk, er í takt við umheimin. Enn vita vit ikki, um so verður, og vit fara, sum sami høvundur vísir á, at gera nógv mistøk. Men við at seta sær mál nú og at orða eina strategi fyri at røkka hesum málum, so eru vit á rættari leið. Vit fara annars enn einaferð at tríva í framløgu løgmans.

Løgmaður og harvið landsstýrið gera vart við, at gransking og nýmenning eru týðandi fortreytir fyri, at Føroyar kunnu gerast eitt av heimsins mest framkomnu londum. Vit skulu tí stimbra hugskotsmenning, so at nýggir vinnumøguleikar verða skaptir.Mál samgongunnar er, at í 2015 verða 3% av BTÚ nýtt til gransking og menning, harav eigur helvtin at koma frá tí almenna og helvtin frá tí privata. Hetta er ikki bert eitt skilagott mál í sjálvum sær - hetta er ein avgjørd fortreyt, um vit framyvir skulu kunna vera í takt við umheimin. Landsstýrið ætlar at seta á stovn ein grunn til at fíggja gransking og nýmenning. Sum innskot í grunnin skal fara ein triðingur av inntøkum landskassans frá einskiljingunum - upp til 1 mia. kr.

Setast skal eisini á stovn ein granskingarlund ella granskarapark, sum skal leggja dent á lív- og ílegutøkniska gransking. Hesin stovnur skal hava ein miðsavnandi leiklut í at brúka granskingarúrslit til vinnulig endamál, og soleiðis gera sítt til, at føroyskar fyritøkur og vørur standa seg í aljtóða kapping. Granskingarumhvørvið verður styrkt við m.a. at fáa í lag samstarv millum granskingarstovnar og lærda háskúlan. Somuleiðis er neyðugt at styrkja netverk og samstarv við útlond, millum annað við luttøku í ES-verkætlanum, har okkara samstarvs-møguleikar vaksa munandi, um vit sjálvi hava eitt sterkt og virkið granskingarumhvørvi. Til tess at samskipa játtanirnar til gransking skal verandi granskingarbygnaður umskipast. Sett verður á stovn Føroya Vísindaráð, ið skal orða yvirskipaða granskingarpolitikkin, raðfesta og veita fíggjartrygd. Í ráðnum sita løgmaður, avvarðandi landsstýrismenn og umboð fyri vinnu og gransking. Hetta er gott, men ansast má eftir, at ikki einvíst verður satsað uppá náttúruvísindi, men at javnvágur verður millum øll vísindi.

Tað er einki at ivast í, at her hevur samgongan fatur á eini tí mest týðandi fortreytini fyri at røkka visiónini. Men her stendur, sum longu formaður Sjálsvtýrsifloksins hevur víst á, einki um, hvussu strategiin skal fíggjast. Hetta er ein veikleiki, tó so, at ein millum reglurnar kann lesa, at fíggingin av íløgunum skal koma frá privatiseringunum. Hetta er eitt gott hugskot og betri kann ein vinningur av einskiljingum ikki fara. Hinvegin hava vit enn einki svar til spurningin, hvussu raksturin av hesum og øðrum økjum av týdningini fyri visiónina framyvir skulu fíggjast. Higartil er jú bara skorið niður, har onnur lond satsa størri og størri upphæddir - ikki minst til útbúgving og gransking. Í so máta er henda samgonga lítið mætari enn undanfarna. Her má annað skinn takaast um bak! Vónandi fer orðaskiftið at geva okkum eina hóming av svarinum. Tað hevur týdning fyri trúvirðið og álit almenningsins við atliti at visiónini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Løgtingsformaðurin sigur ósatt og lækkar tign tingsins

**Edmund Joensen var sjálvur við til at gera og leggja uppskotið fram um at hækka løgtingslønirnar, men sigur ósatt til tess at niðurgera hampafólk, ið siga sína hugsan alment**



**Høgni Hoydal**

Løgtingsformaðurin Edmund Joensen er av ókendum orsøkum farin í eitt satt persónligt víggj mótvegis borgarum, ið erliga standa fram og tora at siga sína hugsan um samfelagsviðurskiftir og politiskar raðfestingar í Føroyum.

Hesir bæði duga og tora tíbetur at svara fyri seg, og eg fari ikki at leggja meg út í innihaldið í tí kjakinum.

Men tað er lítið virðiligt fyri ein løgtingsformann at nýta tey mest ódámligu amboðini, ið eyðkenna og drepa alt skilagott orðaskifti í Føroyum: At seta spjaldur á fólk, at leggja tey undir gerðirnar hjá ávísum politikarum og politiskum flokkum, at tala um tey niðrandi og leggja eftir persónum, heldur enn eftir innihaldinum.

Hetta er beinleiðis ósømiligt, og tá løgtingsformaðurin gongur á odda, so kann hetta bara lækka um tign tingsins millum fólk. Heldur átti løgtingsformaðurin at fegnast um og eggja til, at fólk tora at siga sína hugsan uttan at verða forfylgd og køvd av politikarum, ið fáa løn fyri at siga sína meining.

Uppaftur verri er tað, at løgtingsformaðurin nú í trimum blaðgreinum á rað hevur sagt beinleiðis ósatt fyri at niðurgera persónarnar, ið hann leggur eftir. Við ósannindum roynir hann at seta spjaldur á persónarnar og síðani at geva teimum ábyrgdina fyri eini illa umtóktari avgerð.

Løgtingsformaðurin endurtekur upp í saman: "at fullveldislandsstýrið byrjaði við at hækka sínar lønir"!

Tað er beinleiðis ósatt, og útsagnir Edmund Joensens eru ódámligt hykl.

Fullveldislandsstýrið hækkaði ikki sínar egnu lønir - ongin broyting varð í løn landsstýrismanna og landsstýrið hevði onki við uppskotið at gera.

Hinvegin hækkaði Løgtingið sínar egnu lønir, og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum mælti beinleiðis frá, at samtykkja lønarhækkingina.

Tað var allur formansskapurin við tingmonnum úr øllum teimum stóru flokkunum, ið stóðu aftan fyri uppskotið um lønarhækking til tingfólk, hóast táverandi Løgtingsformaðurin tók og fekk alla ábyrgdina á seg.

Ein, sum stuðlaði og arbeiddi við uppskotinum, men kortini valdi at atkvøða ímóti, tá hann var vísur í at meiriluti fekst, var sjálvur Edmund Joensen, sum var limur í formansskapinum. Formansskapurin við Edmundi Joensen hevði í felag gjørt uppskotið - ein serlig nevnd varð síðani sett við umboðum úr øllum flokkum at viðgera málið víðari - og síðani varð tað lagt aftur fyri tingið.

Umboð Tjóðveldisflokksins í serligu nevndini, mælti frá at samtykkja tað, og í Tjóðveldisflokkinum vóru fleiri ímóti uppskotinum.

Tá atkvøtt varð í tinginum, vóru fólk fyri og ímóti í øllum flokkum, men ein meiriluti varð fingin í lag við atkvøðum tvørturum bæði andstøðu og samgongu. Bara í Miðflokkinum, sum tá hevði ein tinglim, var atkvøðan greitt ímóti.

Tey, ið hava áhuga fyri at fáa sannleikan at vita um hetta mál, kunnu fara á heimasíðu Løgtingsins ella venda sær til Løgtingið at hyggja at løgtingsmáli nr. 73/1998 - og biða um eitt avrit av atkvøðugreiðsluni.

Men nógv fyri, at tað ikki er eftirfarandi, tá sjálvur løgtingsformaðurin úttalar seg um tingsins virki.

# Hví svarar 112 ikki. Objektið og subjektið

**Páll Poulsen**



Um ein skipan skal bera samfelagið á eitt hægri stig, er neyðugt at strukturerin í skipanini ber vitanina fram, tí annars riggar skipanin ikki. Hetta krevur at persónarnir í skipanini læra at teir ikki seta seg sjálvar og persónlig áhugamál framum at sjálvt endamálið, tað er at menna skipanina.

Orsøkin til at heilsuverkið í Fraklandi er á hægsta stigi, er tí fraklendingar hava loyst teir strukturellu trupulleikarnar. Har ber ikki til at siga:"Vit lata handan doyggja", ella "hasin fær einki, tí tað er hann." Øll kenna søguna um "løgfrøðingin" hjá landsstýrinum, sum helt at hann ikki skuldi svara í rættinum, tá ið dómarin bað hann svara. Einaferð með alla vísti hann danska dómaranum at fyrisitingin í áttatiárunum var fyriskipað av fullkomiliga hugblástum fólki.

Ídag hava teir "gloymt" tað og sirkussið frá áttatiárunum fær frið at koma fyri seg, tað kallast bara okkurt annað.

Tað er farið inn í blóðið, sær tú um patienturin doyr, so fær hann tað ongantíð at vita. Men eingin fær meg at trúgva at tað er rætt.

Fólk duga ikki at skilja ímillum objektið, tað tey gera, og subjektið, tað tey skulu viðgera. Tí tað eru "VIT", hendir einki, tí subjektið er minst líka vitstolið sum "VIT."

Subjektið verður sent í deyðan, tí skipanin er objektivt defekt. Sigur tú tað við tey, riggar 112 ikki.

Jamen sær tú, um tann ið ringir 112 doyr, so ger tað einki. Vit eru í Føroyum!

Eitt danskt høvd helt at danir áttu at fingið aðra karakterskipan. Heldur enn 13 skalain, eina 10 tals skipan, sum gongur niður á minus 3. Kanska áttu føroyingar at fingið sær Fahrenheit, heldur enn Celsius stig, 18 hitastig verða til 64. Tað er gott fyri ferðavinnuna og tá tað er lýtt, fara eggini helst eisini at speila seg sjálvi.

Og um veturin fáa vit fleiri kuldastig enn Grønland.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.